**Løgtingið**
Løgtingsmál nr. 41/2019: Uppskot til eykajáttanarløgtingslóg fyri desember 2019

# Uppskot
# til
# eykajáttanarløgtingslóg
# fyri desember 2019

Fíggjarmálaráðið

# Høvuðsyvirlit

**Høvuðsyvirlit yvir Eykajáttan v/løgtingslóg**

| Túsund kr. | | Rakstraræltlan Útreiðslur | Rakstrarætlan Inntøkur | Løgu-ætlan |
|---|---|---|---|---|
| **§ 1.** | **Løgtingið** | **-** | **-** | **-** |
| | 10. Løgtingið | - | - | - |
| **§ 2.** | **Løgmansfyrisitingin** | **-** | **-** | **-** |
| | 11. Felagsútreiðslur | - | - | - |
| | 12. Landsstýrið | - | - | - |
| | 13. Uttanríkismál | - | - | - |
| | 14. Lógarmál | - | - | - |
| **§ 3.** | **Fíggjarmál** | **-** | **-** | **-** |
| | 11. Felagsútreiðslur | - | - | - |
| | 13. Uttanríkismál | - | - | - |
| | 15. Fíggjarmál o.a. | - | - | - |
| | 18. Almenn starvsfólk v.m. | - | - | - |
| | 21. Almannamál | - | - | - |
| | 22. Íbúðarmál | - | - | - |
| | 24. Mentan | - | - | - |
| | 38. Samferðsla og samskifti | - | - | - |
| **§ 5.** | **Fiskivinnumál** | **-** | **-** | **-** |
| | 11. Felagsútreiðslur | - | - | - |
| | 31. Tilbúgving | - | - | - |
| | 33. Landbúnaður | - | - | - |
| | 34. Fiskivinna | - | - | - |
| **§ 7.** | **Uttanríkis- og mentamál** | **0** | **-** | **-** |
| | 11. Felagsútreiðslur | - | - | - |
| | 23. Útbúgving og gransking | -800 | - | - |
| | 24. Mentan | 800 | - | - |
| | 38. Samferðsla og samskifti | - | - | - |
| **§ 11.** | **Heilsumál** | **-** | **-** | **-** |
| | 11. Felagsútreiðslur | - | - | - |
| | 14. Lógarmál | - | - | - |
| | 20. Heilsumál | - | - | - |
| | 21. Almannamál | - | - | - |
| | 30. Umhvørvi | - | - | - |
| | 32. Ráevnisvinna | - | - | - |
| | 37. Handil og vinna annars | - | - | - |
| **§ 12.** | **Almannamál** | **-** | **-** | **-** |
| | 11. Felagsútreiðslur | - | - | - |
| | 14. Lógarmál | - | - | - |
| | 21. Almannamál | - | - | - |
| **§ 13.** | **Uttanríkis- og vinnumál** | **-** | **-** | **-** |
| | 11. Felagsútreiðslur | - | - | - |
| | 13. Uttanríkismál | - | - | - |
| | 32. Ráevnisvinna | - | - | - |
| | 33. Landbúnaður | - | - | - |
| | 35. Sjóvinna | - | - | - |
| | 36. Aling | - | - | - |
| | 37. Handil og vinna annars | - | - | - |
| | 38. Samferðsla og samskifti | - | - | - |
| **§ 17.** | **Samferðslumál** | **-6.000** | **-** | **17.500** |
| | 11. Felagsútreiðslur | - | - | - |
| | 21. Almannamál | - | - | - |
| | 38. Samferðsla og samskifti | -6.000 | - | 17.500 |
| | 39. Arbeiðsmarknaður | - | - | - |
| **Tilsamans** | | **-6.000** | **-** | **17.500** |
| § 20. | 50. Rentur | - | - | - |
| § 20. | 52. Skattir og avgjøld | - | - | - |
| § 20. | 54. Ríkisstuðul | - | - | - |
| Tilsamans | | -6.000 | - | 17.500 |
| | | Útreiðslur | Inntøkur | Yvirskot |
| | | 11.500 | - | -11.500 |

# Tekstur

# § 7 Uttanríkis- og mentamál

## A. Yvirlit

*Játtanar yvirlit*

| Tús. kr. | | Netto | Útreiðslur | Inntøkur |
|---|---|---|---|---|
| Útreiðsluætlan | | 0 | 0 | - |
| **Útbúgving og gransking** | | | **-800** | **-** |
| 7.23.5. | Fólkaupplýsing | | -800 | - |
| **Mentan** | | | **800** | **-** |
| 7.24.6. | Ítróttur | | 800 | - |

## B. Játtanir

| | | Útreiðslur | Inntøkur |
|---|---|---|---|
| **7.23.5. Fólkaupplýsing** | | | |
| 06. Listaskúli á Sandoynni (Stuðulsj.) | J | 1.000 | - |
| | **EYJ** | **-800** | **-** |
| **7.24.6. Ítróttur** | | | |
| 06. Ítróttasamband Føroya (Stuðulsj.) | J | 10.250 | - |
| | **EYJ** | **800** | **-** |

## C. Átekningar

**Nr. 1. Høvuðskonta 7.23.3.09. Skúladepil við Marknagil (Løgujáttan)**
Landsstýrismanninum verður heimilað at flyta óbrúkta játtan til seinni fíggjarár.

# § 17 Samferðslumál

## A. Yvirlit

*Játtanar yvirlit*

| Tús. kr. | | Netto | Útreiðslur | Inntøkur |
|---|---|---|---|---|
| Útreiðsluætlan | | -6.000 | -6.000 | - |
| Løguætlan | | 17.500 | 17.500 | - |
| **Samferðsla og samskifti** | | | **11.500** | **-** |
| 17.38.1. | Vegir og havnir | | 1.500 | - |
| 17.38.2. | Samferðsla | | 10.000 | - |

## B. Játtanir

| | | | Útreiðslur | Inntøkur |
|---|---|---|---|---|
| **17.38.1.** | **Vegir og havnir** | | | |
| 02. | Landsverk (Rakstrarj.) | J | 67.995 | - |
| | | **EYJ** | **-6.000** | **-** |
| 22. | Asfaltverkið á Sundi (Løguj.) | J | - | - |
| | | **EYJ** | **7.500** | **-** |
| **17.38.2.** | **Samferðsla** | | | |
| 02. | Strandfaraskip landsins (Løguj.) | J | 47.500 | - |
| | | **EYJ** | **10.000** | **-** |

## C. Átekningar

**Nr. 2. Høvuðskonta 17.38.1.22. Asfaltverkið á Sundi (Løgujáttan)**
Landsstýrismanninum verður heimilað at flyta óbrúkta játtan til seinni fíggjarár.

**Nr. 3. Høvuðskonta 17.38.2.02. Strandfaraskip landsins (Løgujáttan)**
Landsstýrismanninum verður heimilað at flyta óbrúkta játtan til seinni fíggjarár.

# Almennar viðmerkingar

Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum leggur við hesum fram eykajáttanarløgtingslóg fyri Løgtingið.

Samanumtikið gevur hetta eykajáttanaruppskotið eitt samanlagt hall á 11,5 mió. kr. (RLÚ 1). Tó skal verða viðmerkt, at átekningarnar í eykajáttanaruppskotinum eru tiknar við, tí roknað verður við mettari minninýtslu á 14-16 mió. kr. tilsamans á teimum løgujáttanunum.

Eykajáttanaruppskotið fevnir um fylgjandi:

Á § 7 Mentamál verður biðið um 0 mió. kr. Biðið verður um, at játtanin til Listaskúla á Sandoynni verður lækkað við 800 tús. kr., og at játtanin til Ítróttasamband Føroya verður hækkað við 800 tús. kr.

Eisini verður biðið um átekning til løgujáttanina Skúladepil við Marknagil.

Á § 17 Samferðslumál verður biðið um netto 11,5 mió. kr. Biðið verður um, at játtanin til Landsverk verður lækkað við 6,0 mió. kr., at løgujáttanin Asfaltverkið á Sundi verður hækkað við 7,5 mió. kr., og at løgujáttanin til Strandfaraskip landsins verður hækkað við 10,0 mió. kr.

Eisini verður biðið um átekningar til løgujáttanirnar Asfaltverkið á Sundi og Strandfaraskip landsins.

Fíggjarmálaráðið, 2. desember 2019

Jørgen Niclasen
landsstýrismaður

/ Bjarni Askham Bjarnason

# Viðmerkingar

# § 7 Uttanríkis- og mentamál

## Útbúgving og gransking

### 7.23.3. Miðnámsútbúgvingar

#### 7.23.3.09. Skúladepil við Marknagil (Løgujáttan)

Landsverk hevur boðað Uttanríkis- og mentamálaráðnum frá, at arbeiðið við at gera skúladepilin í Tórshavn lidnan verður ikki liðugt í ár. Biðið verður tí um at fáa eina átekning á játtanina, ið heimilar landsstýrismanninum at flyta óbrúkta játtan til seinni fíggjarár. Metta nýtslan í ár verður 18-20 mió. kr., og sostatt verða væntandi 4-6 mió. kr. fluttar til fíggjarárið 2020.

Á fíggjarlógini eru játtaðar 23,9 mió. kr. til at byggja skúladepilin í Tórshavn lidnan. Ll. nr. 67 frá 9. mai 2019 er galdandi fyri verkætlanina. Løgtingslógin fer úr gildi 31. desember 2019, og verður tí neyðugt at leingja gildistíðina til 31. desember 2020.

Orsøkin til, at arbeiðið ikki verður liðugt í ár, er í høvuðsheitum, at prosjekteringin og arbeiðini drógu so mikið langt út, sum tey gjørdu, at ráðgevar og arbeiðstakarar komu í ta støðu, at tey arbeiði, ið teir skuldu fara til eftir byggingina av skúladeplinum stóðu og vóru byrjað. Starvsfólk vóru tí flutt til nýggjar verkætlanir, og hevur tað síðani verið tíðarkrevjandi at fáa arbeiðstakarar at binda seg til at fáa arbeiðini gjørd liðug. Aðrar avbjóðingar hava eisini stungið seg upp, og eru vaksnar í vavi og tykist ikki møguligt at fáa hesar avgreiddar í inniverandi ári.

Í høvuðsheitum er hetta orsøkin til, at eitt nú sólavskerming av rútunum, samanstoyping av elementum, ventilatión og arbeiðið við jarðhitaskipanini ikki verður liðugt í ár.

*Sundurgreinað ætlan*

| Tús. kr. | J | EYJ | J+EYJ |
|---|---|---|---|
| Útreiðslujáttan | 23.900 | - | 23.900 |
| **10. Skúladepil við Marknagil** | | | |
| **Útreiðslur** | **23.900** | **-** | **23.900** |
| 31. Bygging og løguframleiðsla | 23.900 | - | 23.900 |

*Átekning*

Landsstýrismanninum verður heimilað at flyta óbrúkta játtan til seinni fíggjarár.

## 7.23.5. Fólkaupplýsing

### 7.23.5.06. Listaskúli á Sandoynni (Stuðulsjáttan)

Av tí, at einki virksemi hevur verið higartil í ár, kann játtanin verða lækkað við 800 tús. kr.

*Sundurgreinað ætlan*

| Tús. kr. | J | EYJ | J+EYJ |
|---|---|---|---|
| Útreiðslujáttan | 1.000 | -800 | 200 |
| **01. Listaskúli á Sandoynni** | | | |
| **Útreiðslur** | **1.000** | **-800** | **200** |
| 71. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | 1.000 | -800 | 200 |

# Mentan

## 7.24.6. Ítróttur

### 7.24.6.06. Ítróttasamband Føroya (Stuðulsjáttan)

A-landsliðið hjá monnum í hondbólti luttók fyrr í ár í undankappingini til EM 2020, har heimadystirnir máttu spælast uttanlands, tí ongin høll er í Føroyum, sum lýkur krøvini hjá Evropeiska Hondbóltssambandinum. Hondbóltssamband Føroya hevði í hesum sambandi rættiliga fitt av óvæntaðum eykaútreiðslum. Fyri at lætta um fíggjarliga, vegna óvæntaðu eykaútreiðslurnar í 2019, verður biðið um, at 800 tús. kr. verða játtaðar eingangs til Ítróttasamband Føroya, eyðmerkt til Hondbóltssamband Føroya.

*Sundurgreinað ætlan*

| Tús. kr. | J | EYJ | J+EYJ |
|---|---|---|---|
| Útreiðslujáttan | 10.250 | 800 | 11.050 |
| **01. ÍSF** | | | |
| **Útreiðslur** | **8.650** | **800** | **9.450** |
| 54. Stuðul til annað virksemi | 8.650 | 800 | 9.450 |
| **04. Parasport Føroyar** | | | |
| **Útreiðslur** | **300** | **-** | **300** |
| 54. Stuðul til annað virksemi | 300 | - | 300 |
| **05. Altjóða ítróttaluttøka** | | | |
| **Útreiðslur** | **500** | **-** | **500** |
| 54. Stuðul til annað virksemi | 500 | - | 500 |
| **06. Úrvalsítróttur** | | | |
| **Útreiðslur** | **800** | **-** | **800** |
| 54. Stuðul til annað virksemi | 800 | - | 800 |

# § 17 Samferðslumál

## Samferðsla og samskifti

### 17.38.1. Vegir og havnir

#### 17.38.1.02. Landsverk (Rakstrarjáttan)

Væntað avlop á asfaltsølu, men eisini á skerv- og bitumensølu, er 6 mió. kr. í 2019. Í staðin fyri, at avlopið í inntøkufíggjaða virkseminum verður nýtt til útgerð og ábøtur, verður játtanin lækkað samsvarandi metta avlopinum, so avlopið í stóran mun kann fíggja løgujáttanina til asfaltverkið á Sundi.

Biðið verður um, at játtanin til Landsverk verður lækkað við 6 mió. kr. í 2019.

*Sundurgreinað ætlan*

| Tús. kr. | | J | EYJ | J+EYJ |
|---|---|---|---|---|
| Nettoútreiðslujáttan | | 67.995 | -6.000 | 61.995 |
| Útreiðslur | | 185.885 | - | 185.885 |
| Inntøkur | | 117.890 | 6.000 | 123.890 |
| **20. Landsverksskrivstovan** | | | | |
| Nettoútreiðsla | | 8.540 | - | 8.540 |
| **Útreiðslur** | | **18.090** | **-** | **18.090** |
| 11. | Lønir v.m. | 8.252 | - | 8.252 |
| 14. | Keyp av vørum og tænastum | 5.850 | - | 5.850 |
| 15. | Keyp av útbúnaði, netto | 250 | - | 250 |
| 16. | Leiga, viðlíkahald og skattur | 3.380 | - | 3.380 |
| 71. | Innanh. flyt. millum almennar stovn. | 358 | - | 358 |
| **Inntøkur** | | **9.550** | **-** | **9.550** |
| *21.* | *Søla av vøru og tænastum* | *100* | *-* | *100* |
| *29.* | *Ymsar rakstrarinntøkur* | *50* | *-* | *50* |
| *76.* | *Innanh. flyt. millum almennar stovn.* | *9.400* | *-* | *9.400* |
| **22. Byggi- og bygningsumsiting landsins** | | | | |
| Nettoútreiðsla | | 9.044 | - | 9.044 |
| **Útreiðslur** | | **22.424** | **-** | **22.424** |
| 11. | Lønir v.m. | 15.064 | - | 15.064 |
| 14. | Keyp av vørum og tænastum | 7.360 | - | 7.360 |
| **Inntøkur** | | **13.380** | **-** | **13.380** |
| *21.* | *Søla av vøru og tænastum* | *100* | *-* | *100* |
| *76.* | *Innanh. flyt. millum almennar stovn.* | *13.280* | *-* | *13.280* |

**23. Royndarverkætlan við orkusparing í landsins bygningum**

| | | | |
|---|---|---|---|
| Nettoútreiðsla | 0 | - | 0 |
| **Útreiðslur** | **3.060** | **-** | **3.060** |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | 3.060 | - | 3.060 |
| **Inntøkur** | **3.060** | **-** | **3.060** |
| *76. Innanh. flyt. millum almennar stovn.* | *3.060* | *-* | *3.060* |

**30. Landsvegahald**

| | | | |
|---|---|---|---|
| Nettoútreiðsla | 43.850 | - | 43.850 |
| **Útreiðslur** | **51.850** | **-** | **51.850** |
| 11. Lønir v.m. | 19.780 | - | 19.780 |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | 17.000 | - | 17.000 |
| 15. Keyp av útbúnaði, netto | 5.000 | - | 5.000 |
| 16. Leiga, viðlíkahald og skattur | 6.070 | - | 6.070 |
| 71. Innanh. flyt. millum almennar stovn. | 4.000 | - | 4.000 |
| **Inntøkur** | **8.000** | **-** | **8.000** |
| *21. Søla av vøru og tænastum* | *1.750* | *-* | *1.750* |
| *76. Innanh. flyt. millum almennar stovn.* | *6.250* | *-* | *6.250* |

**35. Havnir**

| | | | |
|---|---|---|---|
| Nettoútreiðsla | 5.325 | - | 5.325 |
| **Útreiðslur** | **6.450** | **-** | **6.450** |
| 11. Lønir v.m. | 3.600 | - | 3.600 |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | 1.840 | - | 1.840 |
| 15. Keyp av útbúnaði, netto | 350 | - | 350 |
| 16. Leiga, viðlíkahald og skattur | 660 | - | 660 |
| **Inntøkur** | **1.125** | **-** | **1.125** |
| *21. Søla av vøru og tænastum* | *500* | *-* | *500* |
| *76. Innanh. flyt. millum almennar stovn.* | *625* | *-* | *625* |

**38. Flogferðsla**

| | | | |
|---|---|---|---|
| Nettoútreiðsla | 1.236 | - | 1.236 |
| **Útreiðslur** | **2.011** | **-** | **2.011** |
| 11. Lønir v.m. | 1.421 | - | 1.421 |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | 500 | - | 500 |
| 15. Keyp av útbúnaði, netto | 20 | - | 20 |
| 16. Leiga, viðlíkahald og skattur | 70 | - | 70 |
| **Inntøkur** | **775** | **-** | **775** |
| *21. Søla av vøru og tænastum* | *400* | *-* | *400* |
| *76. Innanh. flyt. millum almennar stovn.* | *375* | *-* | *375* |

**40. Inntøkufíggjað virksemi**

| | | | |
|---|---|---|---|
| Nettoútreiðsla | 0 | -6.000 | -6.000 |
| **Útreiðslur** | **82.000** | **-** | **82.000** |
| 11. Lønir v.m. | 22.600 | - | 22.600 |
| 14. Keyp av vørum og tænastum | 42.400 | - | 42.400 |
| 15. Keyp av útbúnaði, netto | 8.000 | - | 8.000 |
| 16. Leiga, viðlíkahald og skattur | 9.000 | - | 9.000 |
| **Inntøkur** | **82.000** | **6.000** | **88.000** |
| *21. Søla av vøru og tænastum* | *82.000* | *6.000* | *88.000* |

### 17.38.1.22. Asfaltverkið á Sundi (Løgujáttan)

Til tess at fáa asfaltverkið á Sundi at koyra aftur er neyðugt við útskiftingum av rørleiðingum og bitumentangum fyri áleið 7,5 mió. kr.

Neyðugt er at bíleggja útgerðina sum skjótast, so útgerðin kann verða veitt um páskir í 2020 fyri at tryggja, at sáttmálan við NCC um veiting av asfalti til Eysturoyartunnilin kann verða hildin.

Átekning til at fáa heimild til at flyta óbrúkta játtan til 2020 er neyðug, tí størri parturin av útreiðslunum fellur í 2020.

Biðið verður um eykajáttan á 7,5 mió. kr. í 2019.

*Sundurgreinað ætlan*

| Tús. kr. | J | EYJ | J+EYJ |
|---|---|---|---|
| Útreiðslujáttan | - | 7.500 | 7.500 |
| **10. Asfaltverkið á Sundi** | | | |
| **Útreiðslur** | **-** | **7.500** | **7.500** |
| 32. Útvegan av løgu o.ø. | - | 7.500 | 7.500 |

*Átekning*
Landsstýrismanninum verður heimilað at flyta óbrúkta játtan til seinni fíggjarár.

## 17.38.2. Samferðsla

### 17.38.2.02. Strandfaraskip landsins (Løgujáttan)

**01. Sandoyarskip**
Sandoyarleiðin hevur seinnu árini verið merkt av støðugum vøkstri í farma- og ferðafólkatali.

Ymiskt hevur verið gjørt fyri at nøkta tann alsamt vaksandi tørvin; túratalið er økt til tað mesta, ið loyvt er, tá atlit skal takast til altjóða reglur og sáttmálar við manningarfeløg.

Síðani boringin upp á Sandoyartunnilin byrjaði, er tørvurin á dekksplássi øktur enn meira av tungum betongbilum, sum skulu um fjørðin. Hvør av hesum bilum tekur umleið 8 pláss frá persónbilunum, sum kappast um sama pláss. Sandoyarmegin fer eisini nýtt virksemi ígongd. Alifyritøka hevur sagt, at teir vænta 100 til 150 tons um vikuna sum tørva flutning á vári 2020 og frameftir. Eisini fer ein komandi Dalstunnil at leggja enn meira trýst á farleiðina Skopun/Gamlarætt. Allar metingar hjá SSL vísa, at stovnurin ikki fer at megna at lyfta hesa uppgávu frameftir við verandi flota.

Strandfaraskip Landsins hevur seinastu tíðina hugt eftir um til ber at fáa hóskandi lastaskip til vega fyri at taka tað ringasta trýstið, sum fer at koma á Teistan.

Biðið verður um eykajáttan á 10 mió. kr. til endamálið. Tá eru klassakrøvini til ymiskar tilrættingar íroknað. Árligi raksturin væntast at kosta uml. 7 mió. kr., sum SSL metir kann fíggjast av stóra farmaflutningum.

Neyðugt verður við átekning til at heimila flyting av óbrúktari játtan til 2020.

## 04. Eykabátur

Arbeiðið at smíða eykabátin til Strandferðsluna verður mett at verða liðugt í mai 2020. Nýggj meting frá Strandferðsluni er, at áleið 10 mió. kr. ikki verða nýttar í fíggjarárinum 2019, men í 2020.

Neyðugt verður við átekning til at heimila flyting av óbrúktari játtan til 2020.

*Sundurgreinað ætlan*

| Tús. kr. | J | EYJ | J+EYJ |
|---|---|---|---|
| Útreiðslujáttan | 47.500 | 10.000 | 57.500 |
| **01. Sandoyarskip** | | | |
| **Útreiðslur** | **-** | **10.000** | **10.000** |
| 32. Útvegan av løgu o.ø. | - | 10.000 | 10.000 |
| **03. Suðuroyarskip** | | | |
| **Útreiðslur** | **29.500** | **-** | **29.500** |
| 16. Leiga, viðlíkahald og skattur | 19.000 | - | 19.000 |
| 19. Ymsar rakstrarútreiðslur | 1.500 | - | 1.500 |
| 31. Bygging og løguframleiðsla | 9.000 | - | 9.000 |
| **04. Eykabátur** | | | |
| **Útreiðslur** | **18.000** | **-** | **18.000** |
| 31. Bygging og løguframleiðsla | 18.000 | - | 18.000 |

*Átekning*

Landsstýrismanninum verður heimilað at flyta óbrúkta játtan til seinni fíggjarár.